FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 21. november 2025
J. nr.: 25/30331

Svar uppá fyrispurning nr. 52-042/2025 frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um rúsevnaeftirlit

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvør hevur eftirlit við donsku sjóverjuni hvat viðvíkur smugling?
2. Hvussu ofta hevur danska sjóverjan lagt at kai í Føroyum seinasta árið?
3. Hvussu ofta hevur eftirlit verið umborð?
4. Eru rúsevni nakrantíð funnin umborð á donskum sjóverjuskipum?

Svar til spurning nr. 1-4:
Herskip hava órin. Hetta er millum annað ásett í havrættarsáttmálanum (UNCLOS), sum er settur í gildi í Føroyum við bekendtgørelse nr. 17 af 21. juli 2005 af De Forenede Nationers Havretskonvention af 10. december 1982 tillige med den dertil knyttede aftale af 28. juli 1994 om anvendelse af konventionens kapitel XI. Herskip eru viðgjørd í grein 29-32 í konventiónini.

Órin hjá krígsskipum sbrt. havrættarsáttmálanum er fyrst og fremst ætlað mótvegis jurisdiktiónum hjá triðjalondum. Harafturat er viðkomandi at spyrja, hvørt Føroyar eru at rokna sum triðjaland í mun til møguligt órin hjá einum donsku krígsskipi.

TAKS fer tó ikki vanliga umborð á herskip, heldur ikki donsk. Um TAKS skuldi farið umborð á eitt herskip, vildi hetta verið eftir samráð við flaggstatin og skiparan og í samstarvi við løgregluna.

TAKS hevur ikki hagtøl yvir, hvussu ofta danska sjóverjan hevur lagt at bryggju í Føroyum seinasta árið.

Tinganes, 21. november 2025

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum